Skógvar til ÓLAVSØKU
Hjá okkum finnir tú nógv góð ólavsøkutilboð
Skater skógvar
í ymsum litum
28-35 348,-
36-41 378,-
42-46 398,-
Allar sandalir -20%
- SKÓSØLAN Í RUNAVÍK -
tel 44 75 55

Ólavsøkutilboð
Slætt hár á ólavsøku
Fram til 1. august fæst hetta professionella slættijarnið fyri einans 495,- fyrr 850,-
Kvilt Hárfríðkan
Áarvegur 20 · Tel 316362 · Fax 321465

ÓLAVSØKUKLÆÐINI
fært tú hjá okkum
FLJÓÐIÐ
Sigmundargøta 4 • 100 Tórshavn • Tel. 31 17 18

Góð hvítvøru TILBOÐ
Sanay mikroovnur — TILBOÐ 1.395,-
Blomberg komfýrur — TILBOÐ 3.495,-
Blomberg innbygningsovnur — TILBOÐ 4.195,-
Blomberg innbygningsovnur — TILBOÐ 4.595,-
MIELE dustsúgvari — TILBOÐ 1.795,-
Ignis turkitrumbla — TILBOÐ 2.495,-
Køksmiðstøðin

FT
www.travel.fo
Faroe Travel
tlf. 31 26 00

Vøggan Barnaútgerð
Kom inn og sigg okkara stóra úrval millum annað
Barnavognar
Combivognar
Koyristólar
Klappstólar
Bilstólar
Grulvigarðar
Puslikomodir
Pusliborð
Trip Trap stólar
Baby-alarmar
Barna sengur
Vøggur
Seingaútstýr
Vit senda um alt landið
Vøggan
TIF 449588
Í Saltangará
Fax 449499

# Fressarnir syngja aftur

**Høvuðsnavnið á ólavsøkukonsertini er Terji og Føstufressar, sum standa fyri eini tí bestu føroysku tónleikaútgávuni nakrantíð. Teir fara at spæla við upprunaligu manningini**

FØSTUFRESSAR
*Eyðun Klakstein*


*Leivur Thomsen spælir gittar í Føstufressum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað er einki at ivast í, hvat mest forvitnisliga navnið á ólavsøkukonsertini hesaferð er.

Terji og Føstufressar hava ikki spælt saman í nógv ár, og teir hava bara givið eina plátu út, men talan er um kanska mest virdu føroysku plátuna nakrantíð.

Tað var í 1990, at plátan við Terja og Føstufressum kom út, og hóast móttøkan í byrjanini ikki var nakað serligt, so vaks hendan plátan seg stóra og sterka í árunum, sum komu.

– Hetta er tann fløgan, sum hevur havt størst týdning fyri meg, og sum eg havi verið mest nøgdur við, sigur sangarin Terji Rasmussen um útgávuna, sum hann kallar sítt høvuðsverk.

Teir frálíku sangirnir á hesi útgávu hava staðið ímóti tíðarinnar tonn, og teir standa eins sterkir í dag, sum teir gjørdu fyri 10 árum síðani og meira.

## Ongantíð ligið fyri

Tað verður gamla manningin í Føstufressum, sum fer at spæla á ólavsøkukonsertini, og teir ælta sær at spæla sangirnir av útgávuni frá 1990

– Vit gleða okkum sjálvsagt sera nógv til at spæla saman aftur. Tað hevur í veruleikanum ongantíð ligið fyri hjá okkum at spæla saman, tí at bassspælarin hjá okkum, Arnold Ludvig, hevur búð uttanlands síðani 1991, og aðrir hava eisini verið nógv uttanlands, sigur Terji Rasmussen.

– Vit skulu bara uppfríska tónleikin, og fleiri av okkum hava eisini spælt sangirnar frá fløguni við øðrum bólkum gjøgnum árini. Tað verður eingin trupulleiki, tí at tónleikararnir í hesum bólkinum eru teir bestu í Føroyum.

Manningin í Føstufressum er: Terji Rasmussen, Rógvi á Rógvu, Arnold Ludvig, Magnus Johannesen, Leivur Thomsen og Eyðun Nolsøe.